

# Málleyst hjá dønum og svium

Danmark varð á útivølli í Budapest í Ungarn. Dysturin á Ferancvaros Leikvøllinum endaði við javnleiki 0-0. Talan varð um ein heldur keðiligan dyst. Danmark varð frægara liðið í 1. hálvleiki, meðan Ungarn varð frægara liðið í 2. hálvleiki. Ímóti dystarendanum royndi Danmark seg við einum ávísum trýsti, men ov seint varð at broyta um úrslitið. Danmark skal spæla ímóti Portugal á útivølli mikukvøldið, og tapa danir tann dystin byrjar longu at síggja svart út hjá Danmark. Portugal vann ein tryggan 4-0 sigur á Malta. Dysturin millum Albania og Svøríki í Tirana endaði eisini við einari nulloysn. Tað einasta svenskarar kunnu minnast við gleði frá dystinum er, at tað untist Henrik "Henke" Larsson at spæla sín landsdyst nr. 100 fyri Svøríki í kvøld. Svøríki spælir ímóti Ungarn mikukvøldið.

# um



*Johan Troest Davidsen, sum her sæst í luftdysti við Nemanja Vidic, prógvaði aftur sítt fjølbroytni. Hesa ferð sum vinstri bakkur, har hann helst stóð fyri besta føroyska avrikinum í dystinum*
*Mynd: Aleksander Djorovic*

sum sentralur miðvallari, har hann var tann framrættaði parturin av tríbólkinum. Og enn einaferð prógvaði hann, at hann sítt fjølbroytni. Vísti seg støðugt til reiðar at taka neyðugu túrarnar, tá føroyska liðið hevði møguleika at koma niðan eftir vøllinum, og sýndi eisini vilja og dirvi at bjóða av, tó at veruligar vandastøður ikki stóðust av hesum. Var eisini nóg kølin, tá bólturin skuldi spælast, og var soleiðis við til at halda bóltin í føroysku ketuni.

### 11. Símun Samuelsen, Keflavík

Varð hesa ferð í vinstra borði, og saman lagt mundi avrikið teljast millum tey bestu hjá Símuni á landsliðnum. Arbeiddi alla tíðina knallhart í verjupartinum, har hann stuðla bakkinum væl, og var støðugt til reiðar at taka túrin niðaneftir, um møguleikin beyðst til tað. Og fekk soleiðis sent nøkur hálvvandamikil innlegg innfyri. Noyddist skaddur av vøllinum eftir 70 minuttir, men er hann førur fyri at spæla, er lítil ivi um, at hann aftur verður á sama plássi mikukvøldið.

### 12. Andrew av Fløtum, HB

Eftir eitt ár í kuldanum kom Andrew bókstaviliga í hitan við plássi í byrjunaruppstillingini í serbisku grýtuni. Arbeiðstreytirnar vóru truplar, og tær betraðust ikki av, at Andrew onkursvegna kom sær í ringt ljós hjá russiska dómaranum, sum ikki gav einsamalla áleyparanum ein millimetur í kreditt. Arbeiðsavrikið gav tó prógv um, at HB'arin framvegis skal roknast við í landsliðshópinum, men tað kundi kanska verið ynskiligt, um hann ikki lá somikið djúpt á vøllinum, tí teinurin niðan í feltið gjørdist dekan ov langur, tá føroyska liðið hevði møguleikan til innlegg.

### 15. Egil á Bø, EB/Streymur

Eftir góða avrikið í Portugal vann Egil sær afturval í føroysku miðverjuni, har hann saman við Jón Róa stóð sera sterkur í myndini. Hevði sínar sjálvsøgdu trupulleikar av risastóra Zigic, men megnaði støðugt at órógva hendan í loftspælinum. Og tó at hesin heldur heppið kundi økja til 2-0 beint undan dystarloki, vísti veteranurin við bara tveimum landsdystum, at hann skal roknast millum okkara stinnastu verjuspælarar.

### 14. Bogi Løkin, NSÍ

Kom sum einasti innskiftari á vøllin, har hann fekk 20 minuttir at vísa sínar dygdir. Og í sannari arbeiðsøði prógvaði hann púrasta óimponeraður, at hann rættiliga harðliga bankar upp á dyrnar til pláss millum teir fyrstu ellivu.

